gult cyan magenta svart



## EG MEINI TAÐ



*Petur Rouch, vertur í Rót og Rútmu í Útvarpi Føroya*

# Dýr djór

Eitt av vælsignilsunum við at búgva í høvuðsstaðnum er, at seyður ikki fær loyvi at ganga leysur húsanna millum. Tú kanst róliga seta trøð og plantur til prýðis rundanum húsini uttan at verða bangin fyri, at onkur frek ær ger sær til góðar av tulipanunum ella smaðkar sær á stikkelsberini. Havi mangan hugsað um, hvussu nógv vakrari mangar føroyskar bygdir høvdu verið, høvdu menn funnið onkran máta at hildið seyðin uttan fyri sjálva bygdina.

Men fólk hava sjálvandi síni kelidjór, her eru mest hundar og kettur, sum síggjast. Havi kanska onkuntíð tikið til eina bølluta, tá eg havi traðkað uppí ein hundalort, og mangan havi eg merkt henda rama luktin av kattapissi, tá eg havi fjasast uttanfyri húsini, men soleiðis eigur tað at vera.

Hevði sjálvur altíð kettu sum smádrongur á bygd, men tað hevur ikki rættuliga gingið upp fyri mær, hvussu tíðirnar eru broyttar fyrr enn vit nú fingu kettu aftur í húsið fyri góðum ári síðan. Maðurin, sum eg fekk kettlingin frá og eg kannaðu hann gjølla, og báðir vóru samdir um, at talan var um eina løgu. "So mást tú minnast til at keypa henni p-bollar, so hon ikki leggur í tíð og ótíð", ráddi ein vinmaður mær til. Helt tað vera undarligt at fáa eina løgu, sum ikki legði, men problemið loysti seg sjálvt, tí tá eg nakað seinni aftur hugdi undir halan á kettuni, var týðuligt, at talan var ikki um eina løgu, men um ein vælútviklaðan frens. Burtur sæð frá tí, at hann er yvirforkelaður og etur lítið annað enn merkivørur sum Whiskas ella Pussi, so er hann bæði vælvandur og fittur - halda vit. Ein granni gramdi seg um, at hann hevði strintað á trappurnar. Satt at siga, hevði eg ikki hóming av, hvat hetta at strinta var, men síðan er gingið upp fyri mær, at hetta er eitt visitkort av ramum anga, sum frensurin letur frá sær, eitt slag av heilsan til dámurnar, "Kilroy is here!". Onkur legði mær tey ráðini at gelda hann, so slapp eg frá tí trupulleikanum. Hvat ger man ikki fyri frið skyld, men lítið veiggj man vera í einum geldum frensi.

Og hund fái eg mær ongantíð. Las í einum brævakassa fyri kelidjór í einum donskum vikublað fyri stuttum um ein 14-ára gamlan hund, sum aftaná buldrið ein nýggjársaftan var farin at pissa undir seg. Brævakassastjórin setti so saman ymisk sløg av heilivági til hundin og gav hundaeigaranum tey ráð at venda sær til ein hundapsykolog, sum kundi hava hundin í terapi fyri óljóð og larm.

So langt komi eg ongantíð. Og gelda vit frensarnar og lata løgurnar liva uppá p-bollar, so sigur logikkurin mær, at ketturasan hevur dapra framtíð.

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: eirikur@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Eirikur Lindenskov





*– Tað hevði verið gott, um hesin sigurin kundi gjørt, at eg kom meiri fram og slapp at syngja meiri, sigur Guðrun Sólja Jacobsen av Tvøroyri, sum er Árins songrødd.*

Mynd: Áki Bertholdsen

# – Ótrúligt at vinna

**TÓNLEIKUR. 18 ára gamla Guðrun Sólja Jacobsen av Tvøroyri er Árins songrødd. Í triðju royndini eydnaðist tað henni at vinna finaluna**

*Eyðun Klakstein*

Seinasta vikuskiftið var finalan í kappingini Árins songrødd hildin í Havn. Luttakarar úr øllum landinum vóru við í finaluni, men tað kundi bara gerast ein vinnari.

Og tað gjørdist 18 ára gamla Guðrun Sólja Jacobsen av Tvøroyri.

– Hetta er triðju ferð, at eg var við í finaluni og fyrstu ferð, at eg ikki fór eftir sigrinum. Tí kom tað fullkomiliga óvart á meg, at eg vann, sigur Guðrun.

– Eg gjørdi lítið burtur úr sjálvari framførsluni í finaluni, men eg var væl nøgd við framførsluna av sjálvum sanginum. Og tað vóru dómararnir eftir øllum at døma eisini.

### Tikin á bóli

Guðrun hevur fýra ferðir verið við í innleiðandi kappingini í Árins songrødd. Fyrstu ferð gekk illa, men síðani er hon hvørja ferðina komin í finaluna.

Tvær ferðir er hon endað sum nummar 2, men í ár tók hon avgerandi stigið upp á toppin.

– Allir finalistarnir stóðu á pallinum, tá úrslitið skuldi kunngerast leygarkvøldið. Eg stóð eitt sindur aftanfyri, og tá eg hoyrdi, at eg ikki varð nummar 2, hugsaði eg, at eg var ikki millum tey fremstu í ár. Tá vinnarin so varð útnevndur, hugsaði eg fyrst, at onkur annar mátti eita Guðrun.

– Tað gekk ein løta, áðrenn tað gekk upp fyri mær, at eg veruliga hevði vunnið kappingina, greiðir Guðrun frá.

### Hevur avbjóðingar við sær

Guðrun Sólja Jacobsen hevur sungið alment, síðani hon var eini 13 ár, men hon hevur ikki sungið nógv í bólki.

– Eg havi onkuntíð vant í onkrum bólki her suðri, men vit eru ongan veg komin, og í løtuni eri eg ikki í nøkrum bólki. Tað er heldur ikki líkt til, at tað verður nakar bólkur at verða við í næstu tíðina, sigur hon.

Árins songrødd er ein kapping, har fólk syngja aftur við tónleiki, sum er tikin upp frammanundan. Tað ger, at solistar kunnu luttaka í kappingini uttan trupulleikar, og tað hevur eisini gjørt, at Guðrun hevur verið afturvendandi partur av hesi kapping.

– Í ár fór eg við, tí tað vóru so fáir luttakarar í Suðuroy. Eg hugsaði ikki um at vinna kappingina, men um at verða við og umboða Suðuroynna. Eg eri ótrúliga fegin um, at eg vann. Tað var himmalskt, sigur hon.

Og at hon nú er Árins songrødd hevur við sær, at hon fær onkrar uppgávur komandi tíðina. Hon er longu biðin um at spæla á eini konsert á jóansøku, og okkurt annað verður eisini á skránni í summar.

– Tað hevði verið gott, um hesin sigurin kundi gjørt, at eg kom meiri fram og slapp at syngja meiri, sigur Guðrun.





gult cyan magenta svart

# Vágbingur sum sjónleikarskip

**Vágbingur, sum fyrst í áttatiárunum varð seldur til Svøríki, verður nú brúktur sum matstovu- og sjónleikarskip í svenska skergarðinum. Skipið er inrættað við tveimum matstovum, sjónleikarsali og einari rúgvu av øðrum hentleikum**

SKIP
*Eyðun Klakstein*

Ein av lokkandi attraktiónunum í svenska høvuðsstaðnum er gamli Vágbingur, sum var føroyskt fiskiskip í nógv ár.

Nú er skipið umbygt til sjónleikar- og matstovuskip við øllum hugsandi hentleikum, og skipið verður nógv brúkt – bæði tá tað liggur við kai, og tá tað siglir í skergarðinum.

Nú verður Vágbingur kallaður Teaterskeppet, og tað verður nógv gjørt burtur úr umborð á skipinum.

Skipið varð bygt í Portugal í 1959 og er systurskip til Ólav Halga, sum var vaktarskip í Føroyum í nógv ár. Í áttatiárunum varð Vágbingur seldur til Svøríkis, og har varð skipið umbygt til sjónleikar- og matstovuskip.

TeaterSkeppet tekur 300 fólk, og umborð á skipinum eru tvær matstovur, sum samanlagt kunnu hýsa 280 fólkum.

Á tí størri matstovuni er eisini ein pallur, har ymiskar framførslur kunnu vera. Báðar matstovurnar hava barr, og á tí størri matstovuni, kunnu partar av loftinum takast burtur, so fólk kunnu sita undir opnum himni og eta.

### Nógv tøkni í salinum

Undir matstovunum er stórur salur, har fólk kunnu sessast í fyrstafloks biografstólum. Har kunnu 218 fólk vera til fyrilestarar, tónleikaframsførslur, sjónleik, filmsýningar ella annað tiltak.

Hópin av tøkni hoyrir til salin, so tað ber til at hava góðar sýningar av filmi, sjónleiki ella tónleiki.



*Vágbingur, sum plagdi at fiska fyri føroyingar, verður nú brúktur sum sjónleikar- og matstovuskip í og kring svenska høvuðsstaðin*



*Í stóra og væl útgjørda salinum umborð á Teaterskeppet ber til at hyggja eftir filmi ella sjónleiki*

TeaterSkeppet hevur fast pláss mitt í Stockholm. Talan er um eitt stað nærindis Skeppbrúnni, sum liggur stutt frá slottinum.

Ymisk tiltøk eru umborð á Teaterskeppet, men hevur tú eitthvørt serligt tiltak, sum tú ætlar tær at hava, so ber til at leiga skipið.

Verður skipið liggjandi við kai, fært tú tað fyri 3.150 svenskar krónur um tíman, men tú mást gjalda 5.950 svenskar krónur um tíman, skal skipið loysa frá kai. Tú mást leiga skipið í minsta lagi tríggjar tímar, skalt tú sleppa fram at.

### Útferðir

Hóast Teaterskeppet liggur væl miðskeiðis í svenska høvuðsstaðnum, er tað heldur ikki long leið til hugnaligar útferðir á skergarðinum.

Teaterskeppet siglir 12 míl, og tað sigst verða gott í sjónum. Í salinum er nógv gjørt fyri at fáa friðarligar umstøður, og tað er eingin trupulleiki hjá fólki, sum stendur á pallinum, at verða hoyrd í øllum salinum.

Ljóð frá motorinum hoyrist sjálvandi umborð á skipinum, og tað halda tey, sum reka skipið, er ein partur av øðrvísi upplivilsinum, tá fólk fara ein túr við skipinum.

Teaterskeppet er skrásett í Svøríki, og tað er fleiri ferðir umvælt og útbygt. Seinasta stóra útbyggingin var í 1997, tá brúgvin millum annað varð flutt.

Men annars er talan um tað skipið, sum fiskaði fyri føroyingar fyri nógvum árum síðani. Enn hava vit ikki slíkt skip í Føroyum, men tankin átti ikki verið fjarður.



*Umborð á Teaterskeppet ber til at sessast í hugnaligum matstovum, sum samanlagt kunnu hýsa 280 fólkum*



*Tað ber eisini til at hava serliga framsýningar ella søluátøk umborð á skipinum*



*Matstovurnar eru hugnaligar, og tá siglt verður, eru nógvir rútar til at trýsta nøsina ímóti*